

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 01 - 2013

# Kinesarar svangir eftir olju í 2013

Kinesiski eftirspurningurin eftir olju fer at vaksa nógv í 2013 og enn meira enn í undanfarna ári orsakað av einum bøttum búskapi skrivar Shippingwatch. Sambært Barclays fer eftirspurningurin at vaksa við 5% í 2013 sammett við 3-4% í 2012. Kinas olieefterspørgsel vil ifølge flere analyti Framgongd er í kinesiska búskapinum men støddin á hesi framgongd er tengd at teimum tiltøkum, sum stjórnin ætlar at seta í verk fyri at stimra búskapin, sigur Sijin Cheng, analytikari hjá Barclays fyritøkuni. Broytingarnar fara helst at henda í mars eftir partíkongressina, har nýggja leiðslan í Kina alment tekur við. Hann heldur tí, at vit fara at síggja ein sera stóran vøkstur í oljueftirspurninginum seinnu helvt av 2013. Kinesiski íløgubankin China International Capital Corp roknar við einum vøkstri í eftirspurninginum eftir olju uppá 4,7% í ár og bankin metir, at búskapurin í Kina fer at vaksa við 8,2% í ár móti 7,7% í 2012. Roknað verður eisini við, at hesin vøksturin fer at vera hvørt ár fram til 2020. Í stórbankanum Credit Suisse rokna analytikarar við einum eftirspurningi uppá 6,2% í ár.